## Frá HAPPADRÁTTINUM

Sagt verður frá, at frá 1. juli 2009
eru sølustøðini í Kollafirði og Havn
løgd saman í eitt sølustað.

**Seljari er:**

Karin Jacobsen
Suðurrás 6
100 Tórshavn
Tel. 31 47 08 & 21 48 08

**Nevndin fyri**
**Hin Føroyski Happadrátturin**
Áargeil 21 · 100 Tórshavn

## Frá HAPPADRÁTTINUM

Sagt verður frá, at frá 1. juli 2009
eru sølustøðini í Syðrugøtu og
Runavík løgd saman í eitt sølustað.

**Seljari er:**

Marius Skaale
Mýravegur 35
620 Runavík
Tel. 44 73 29

**Nevndin fyri**
**Hin Føroyski Happadrátturin**
Áargeil 21 · 100 Tórshavn

SUNDA KOMMUNA

## Dagstovnurin við Kráir – ein sonn perla, søkir námsfrøðingar

Dagstovnurin við Kráir í Hvalvík er ein samskipaður dagstovnur við vøggustovu, barnagarði og frítíðarskúla.

Vit søkja eftir námsfrøðingum til 30 og 20 tíma størv. 30 tíma størv í vøggustovuni og 20 tíma størv í frítíðarskúlanum at byrja 17. august 2009.

Tað námsfrøðiliga arbeiðið er kveikt úr "tí integrerandi bakgrundini". Tað vil siga, at vit leggja stóran dent á, at arbeiða viðurkennandi og við samavgerðum.

**Tað er av stórum týdningi, at umsøkjarin er:**

- nýhugsandi
- hevur hug at arbeiða við verkætlanum
- sær møguleikar framum forðingar
- sær møguleikar í at starvast á einum samskipaðum stovni
- sær møguleikar í at gera brúk av náttúrini í tí námsfrøðiliga arbeiðinum

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Í tann mun, at námsfrøðingar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran, Honnu Thøgersen, á tlf 737235.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 31. Juli 2009 við telduposti til: krair@sunda.fo, ella við vanligum posti til Dagstovnin við Kráir, Hvalvíksvegur 74, 430 Hvalvík.

Í Sunda kommunu eru tríggir dagstovnar: á Oyrarbakka, í Hvalvík og í Hósvík. Dagstovnurin við Kráir hevur pláss fyri tilsamans 74 børnum, og har eru í løtuni 18 starvsfólk. Leiðararnir á teimum trimum dagstovnunum hava eitt gott og tætt samstarv í samráð við kommununa.

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Verkhúsið Virkni

Verkhúsið Virkni søkir eftir pedagogi til setan 17. august 2009 ella eftir nærri avtalu. Talan er um eitt fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er frá kl 8.00 til 16.00.

**Umsóknir skulu sendast til:**

Verkhúsið Virkni
Berjabrekka 2
100 Tórshavn.
Stílað: Hildur Hermansen, leiðari

**Umsóknarfreist: 31. juli 2009.**

Les alla lýsingina á heimasíðu okkara: www.naerverk.fo

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru tríggjar deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan og Stuðulstænastan. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

Runavíkar kommuna

## Vaskifólk til Dagstovnin við Stórá í Rituvík

Vegna barnsburðarfarloyvi, verður søkt verður eftir vaskifólki til Dagstovnin við Stórá í Rituvík, at byrja 17. august 2009 til 26. mars 2010.

Arbeiðstíðin er 20 timar um vikuna eftir kl. 17.15.

Skrivlig umsókn skal verða Kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 27/7-2009.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jørgin Olsen, leiðara á tlf. 216630.

**Runavíkar kommuna**

# KAPPRÍÐING

**Kappríðing verður ólavsøkudag**
**29. juli kl. 14.00 í Marknagili**

Tilmelding seinast mikudagin 22. juli kl. 19.00

**Ring: 211789 – 263239 – 528151**



**FØROYA RÍÐINGARFELAG**

## Tiltøk/Sølubúð á Ovastevnu

Nú er tíð at biðja um eina sølubúð/høli um tú hevur eitthvørt at selja ella framføra á Ovastevnu 2009.

Øll tiltøk og seljandi ið gera stevnuna hugnaligari og stuttligari eru vælkomin.

Set teg í samband við okkum í seinasta lagi 31. Juli 2009, og hoyr um kostnað og treytir!

**Ring til Unn Perdomo á tlf. 216313**
**ella Guðrun Hansen á tlf 212462.**

**ARBEIÐARAFELAGIÐ »HÆDDIN«**

**Summarfrí**

Skrivstovan er stongd frá 27. juli
til 17. august 2009

***Arbeiðarafelagið "Hæddin"***